Álit

í

løgtingsmáli nr. 84/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Broyting í lækking av pensjón)

Helgi Abrahamsen, Bárður á Steig Nielsen, Johan Dahl, Magnus Rasmussen, Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen og Kaj Leo Holm Johannesen, løgtingsmenn, hava vegna Sambandsflokkin lagt málið fram 9. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 22. mars 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. mars, 13. apríl og 20. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Búskaparráðið, Landsfelag Pensjónista og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Árni Skaale, Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) tekur undir við málinum við hesum viðmerkingum:

Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen hava hesar viðmerkingar:
Sambandsflokkurin er av teirri áskoðan, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða. Tað er eisini galdandi fyri pensjónistar, sum hava vilja, orku og hug til tess.
Tað eru fleiri fyrimunir av at gera tað áhugavert hjá pensjónistum at arbeiða:

- Betrar lívsgóðskuna - liva betur og longur
- Lægri kostnaðir til heilsu og umsorgan
- Økir um arbeiðsútboðið

Við verandi skipan er tað ikki áhugavert hjá einum fólkapensjónisti at arbeiða, tá ársinntøkan fer upp um 60.000 krónur, tí tá missir hann brennioljustuðulin og marginalskatturin av lønini verður um 87 %. Hetta tekur allan hugin at arbeiða frá pensjónistinum.

Til samanberingar kann nevnast, at danir hava tikið seinasta partin av mótrokningini av pensjónum burtur. Hetta er gjørt sum ein liður í at økja um arbeiðsútboðið, sum tað sanniliga er brúk fyri í Føroyum, her stórur tørvur er á arbeiðsmegi í flest øllum geirum, serliga innan røktar- og umsorganarøkið.

Sambandsflokkurin vil við hesum uppskotinum avtaka mótrókningina, tí vit halda, at hon er ein stór forðing fyri, at fleiri hendur í arbeiðsførum aldri vilja arbeiða. Tað er ikki í lagi. Landsstýrismaðurin hevur upplýst fyri Trivnaðarnevndini, at til dømis innan røktarheim er trupult at fáa fólk, ið eru 67 ár ella eldri, at taka vaktir, eftir at tey eru komin upp um markið sum verður mótroknað.
Onkur av hoyringarpørtunum hevur víst á, at árligi kostnaðurin av hesum uppskotinum liggur millum 75 og 100 mió. krónur. Hetta er ein pástandur sum neyvan er rættur, tí um fleiri koma á arbeiðsmarknaðin, so verður eisini goldin meira skattur inn.

Um ein pensjónistur hevur eina arbeiðsinntøku á kr. 200.000, rindar hann á leið kr. 75.000 í almennu kassarnar, ið er ikki er langt frá tí upphædd, viðkomandi fær í pensjón; tí rindar ein arbeiðandi pensjónistur sína egnu pensjón, tá hann arbeiðir. Kanningar vísa eisini, at longur vit eru aktiv, longur liva vit við betri heilsu, tí er eisini ein sparing á heilsu- og umsorganarøkinum. Endaliga kostnaðin kenna vit ikki, fyrr enn skipanin hevur virkað í nøkur ár, og tá ber til at eftirmeta hana. Alt eftir, hvat úrslitið vísir, kann lógin tillagast, ella ein onnur loysn verða funnin.
Innkallingarnar, sum hava verið í Trivnaðarnevndini i samband við málið, hava lýst avbjóðingina við at avtaka mótrokningina, tí mett verður, at haldførið hjá landinum verður sett i váða. Landsbankin og Búskaparráðið vístu á vantandi haldførið og søgdu, at pensjónistar i Føroyum hava tað gott. Tey søgdu, at inntøkustøðið hjá pensjónistunum er næstan á hædd við støðið hjá eini arbeiðarafamilju, sum eisini hevur aðrar útreiðslur, sum pensjóinstar ikki hava, so sum hús, barnagarðar, vøggustovur o.s.fr.

Vit halda hinvegin, at um samráðingar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum ikki hava megnað at lyft sínar bólkar á eitt støði, sum ger tað liviligt hjá teimum, so eigur tað ikki at vera pensjónisturin, sum eigur at bøta fyri tað. Um bæði pensjónistar og lægst løntu lønarbólkar ikki klára seg fíggjarliga, so er støðan ikki nøktandi í einum ríkum vælferðarsamfelag. Siðvenja er, at lønarsamráðingar verða avgjørdir millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, men hinvegin, so er tað okkara politiska uppgáva at finna eina skilagóða loysn á, hvussu pensjónistar skulu kunna arbeiða, eftir at teir hava nátt pensjónsaldur, um hugur framvegis er at arbeiða.
Allir teir stóru flokkarnir lovaðu áðrenn valið at gera tað møguligt hjá pensjónistum at arbeiða, og eisini at avtaka mótrokningina, og vilja vit tí mæla til at halda givin lyftir og samtykkja uppskotið.

Jørgen Niclasen og Árni Skaale hava hesar viðmerkingar:
Mótrokningin, sum í dag byrjar við 45.000 kr. í inntøku, er alt ov lág. Mótrokningin eigur at hækka til í minsta lagi 90.000 kr., sum er tað sama sum hjá fyritíðarpensjónistum. Av tí at tað ikki verður mett at verða identitetur í at gera slíkt broytingaruppskot til fyriliggjandi uppskot verður mælt til at samtykkja uppskotið. Upplýst er fyri Trivnaðarnevndini, at landsstýrið arbeiðir við uppskoti um at hækka markið fyri mótrokning. Fyri at tryggja okkum, at slíkt uppskot kemur í heyst, verður mælt til at samtykkja fyriliggjandi uppskot við teirri broyting, at lógin kemur í gildi 1. januar 2024.

Meirilutin í nevndini setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2 verður orðað soleiðis:

“**§ 2**. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.”

Viðmerkingar:
Gildiskomuásetingin verður broytt, soleiðis at lógin, ístaðin fyri at koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, kemur í gildi 1. januar 2024.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hans Jacob Thomsen, Súsanna Bertholdsen og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar: Upplýst er fyri Trivnaðarnevndini, at tað er ætlanin hjá samgonguni at endurskoða markið fyri mótrokning. Minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 3. mai 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Johan Dahl
Kaj Leo Holm Johannesen	Hans Jacob Thomsen	Súsanna Bertholdsen
	Árni Skaale	